# Nøvn

## TØKK

Hjartaliga takka vit øllum, ið sýndu samkenslu,
tá okkara góða mamma, vermamma,
omma og langomma

**Judith Ellingsgaard**
**Fuglafjørður**

andaðist og varð jarðað.

Takk til heimasjúkrasystrar, heimahjálparar og starvsfólk á Landssjúkrahúsinum.
Takk til Ann Dahl Hansen. prest, fyri góða andakt á Landssjúkrahúsinum.
Takk til Gunnar og Una Næs, prest, fyri góð og troystarrík orð í kapellinum og kikjuni.
Takk til kirkjutænarar, unguleikara, sangarar og gravarar.
Takk til teir 8 og Hannis fyri sang í kirkjuni.
Takk til tykkum, sum stóðu fyri ervinum.
Takk til tykkum øll, sum hjálptu til á ymiskan hátt, og tøkk fyri tína hjálp Marita.
Takk fyri kransar, blómur og heilsanir og takk fyri pengingagávur til Sinnisbata.
Takk til tykkum, sum fylgdu mammu til hennara seinasta hvíldarstað.

***Familjunnar vegna***
**Jonna, Hanne, Gudny, Haldur, Jóngerð og Ólavur**



## TØKK

Hjartaliga tøkk øll somul, ið sýndu samkenslu, tá elskaða kona, mamma, dóttir, systir, svigarinna og verdóttir okkara,

**Unn Winstrøm**

varð jarðað.

Tøkk Berg prest fyri góð og troystarík orð, og tøkk Brian verfaðir fyri vakra og kensluborna talu í kirkjuni.

**Michael, Christoffer, Isabella, Høgni, Titi, Winny, Jógvan, Rinda og Brian**

# Skyldkonuni, Judith hjá Griasi, til minnis



*Syngja smáar aldur við Oyrina sorgarljóð*
*um eina lívsglaða skyldkonu ,*
*sum vaks upp á Sandteignum - við Skarðsá og Toftagarð*
*og hevði røtur í Heiðriksstovu*
*tætt við Sjóvartún -*
*við Oyndarfjørð.*

*Lívsglaða skyldkona á hesi jørð,*
*nú svevur tú um Heygar*
*ein søtan blund*
*og droymir um lív –*
*við gleði og tógvið stríð –*
*á hesi heimsins grund -*
*saman við manni, børnum og bygdarfólki*
*á lívsins ferð,*
*um Fløtugerð*
*við fótbóltsvøll og Innandals,*
*við sjóvarstrond*
*og onnur bygdalond.*

*Tú elskuliga, Judith,*
*vina mín – so lyndisblíð*
*um títt fitta snýð,*
*í lund og sál,*
*um dagsins mál*
*og hvønndagslív,*
*um garðarlið,*
*stýggj og hamralíð.*

*Títt hjartalag – var eitt aldudrag,*
*sum smáaldur kvøða um*
*við sand og Oyrina.*

*Tú farin ert í vetrarblund*
*bert eina skamma stund.*

*Ein dag kemur úr skýgloprum niður*
*ein hvítur maður við sprelskum einglum,*
*sum hoppa og dansa í leysari luft í lýggjum kyldum*
*og syngja:" Judith, reis teg úr grøv – kom nú á ein ævigan, hugfarsligan gleðisfund!"*

**Frits**

# Smiðjan í Gøtu letur upp aftur




Smiðjan í Gøtu, sum fyri fáum mánaðum síðani læt aftur, letur nú upp aftur við nýggjum eigarum. Móttøka verður í dag við nýggjum navni, ÁWAY.

Tað eru brøðurnir, Tollakkur og Álvur Joensen, sum hava keypt smiðjuna. Umframt alt vanligt smiðjuarbeiði hava teir eisini umboð upp á Toyota trukkar.

Smiðjan, sum framman undan æt Normek, hevði nógv fólk í arbeiði.

ÁWAY, sum letur upp í dag, hevur móttøku millum klokkan 15 og 17.